# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Móttøka hjá Faroe Agency:

## Endamálið er veita góða tænastu til útlendsk skip

**Í sambandi við at nýggja fyritøkan Faroe Agency er stovnað, var móttøka Yviri við Strond fríggjadagin 8. oktober. Fleiri hundrað fólk stukku inn á gólvið at heilsa upp á nýggju eigararnar**

MÓTTØKA
*Myndir: Maria Olsen*

Herfyri læt ein tann royndasti føroyingurin innan shippingvirksemi, Árni Dam, upp fyritøkuna Faroe Agency saman við Karl Erik Reynheim, Mariu Lava og Ivan E. Moskalenko. Fyritøkan heldur til Yviri við Strond í Havn. Árni hevur sjálvur starvast við hesum slagi av virksemi síðan 1978.

Endamálið við nýggju fyritøkuni er fyrst og fremst at veita tænastur til útlendsk skip, ið koma til Føroya.

Faroe Agency skal fyrst og fremst virka sum port agents fyri fremmand skip. Tað vil siga, at teir taka sær av øllum tí praktiska viðvíkjandi pappírum, loyvum, møguligari útskifting av manning saman við Atlantic Airways, proviant og øðrum í sambandi við, at eitt fremmant skip kemur til Føroya.

Árni Dam segði í røðu síni m.a. at tá hann byrjaði við agency virkseminum, høvdu teir 64 skip fyrsta árið, og í fjør var talið næstan tíggjufaldað. Teir fóru undir Faroe Agency fyri at tryggja at arbeiði var á føroyskum hondum, og at atlit verða tikin fyri føroyska samfelagnum í arbeiðinum, soleiðis at talið av skipum framhaldandi kann økjast.

Samstarvið við russar hevur øll árini verið ein grundarsteinur í agency arbeiðinum, og síðan Árni í fjør gjørdist russiskur konsul, er hetta arbeiði nógv vaksið.

Útlendsk reiðaríir hava stóran áhuga fyri Føroyum, og síðani nýggja fyritøkan læt upp, hava teir fingið hópin av uppringingum úr útlandinum.



*Árni Dam við eini skemtitekning av Óla P. sum hevur staðið á baksíðuni á Sosialinum*



*Árni Dam heldur røðu, meðan Ivan Moskalenko tolkar fyri skiparunum á russisku skipunum, sum liggja á reduni*



*Óli Jacobsen frá Føroya Fiskimannafelag og Aksel Hansen frá Bacalao*



*Poul Mohr, skipasmiðjustjóri, Tórmóður Djurhuus, advokatur, og Líggjas Joensen frá P/f Farpack*



*Tveir kendir sølumenn, Jógvan Weihe og Jens Petur Egholm*



*Gunnar Mohr, skipasmiðjustjóri, og Ivan Moskalenko, ein av eigarunum av fyritøkuni*



*Karl Erik Reynheim (v.m.) er ein av eigarunum av Faroe Agency*



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Tjarnargarður við Hoyvíksvegin:

## Mia og Andrew vóru fyrstu búfólkini



*Fyrstu búfólkini á Tjarnargarði vóru Andrew og Mia Godtfred. Her eru tey saman við ommu- og abbasoninum Bjarna Bogason og leiðaranum á stovninum, Hensiu Einarsson*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Mánadagin 11. oktober fluttu tey fyrstu búfólkini inn á Tjarnargarð við Hoyvíksvegin í Havn. Tað vóru hjúnini Mia og Andrew Godtfred, sum hava búð í J. Paturssonargøtu í Havn í meira enn 30 ár. Áðrenn tað búðu tey í Vági, har Andrew hevði Shell avgreiðsluna.

Tey eru bæði 90 ára gomul, og vóru tey sera væl nøgd við tær góðu umstøðurnar á Tjarnargarði, har tey hava ein lítla íbúð við sovikamari, eini lítlari stovu og einum væl innrættaðum wc og baðirúmi.

Tjarnargarður er fyrrverandi Marinustøðin, sum Tórshavnar býráð hevur keypt og innrættað til eldraíbúðir. Tilsamans er pláss til 10 búfólk, og í hesi vikuni koma hini átta, sum skulu búgva har. Leiðari á Tjarnargarði er Hensia Einarsson.

Umleið helvtin av Tjarnargarði er gjørdur til eldraíbúðirnar, hin helvtin verður í næstum gjørd til eina demensdeild, har dagtilboð vera til tey demensraktu.

Í sambandi við at eldraíbúðirnar verða lidnar, verður almenn móttøka á Tjarnargarði 21. oktober kl. 15.00, har øll eru vælkomin, sigur Hensia Einarsson.

## Til minnis um
## Dánjal Joensen



Fyrr i ár fingu vit sorgarboðini, at Danjal á Kjalnesi var farin í bestu árum. Hann gjørdist sjúkur fyri bert góðum ári síðani og noyddist at lúta fyri herviligu sjúkuni. Lívsins lagna er óskiljandi fyri okkum vanligu menniskju og stutt er ímillum sorg og gleði, men soleiðis er og verður lívið her á fold.

Dánjal var føddur í 1941 og vaks upp á Kjalnesi, har hann luttók í øllum fyrifallandi arbeiði á garðinum. Hann yvirtók garðin fyrst í sjeytiárunum og var ein teirra, sum gjørdist limur í Mjólkarvirkinum frá fyrsta degi. Hann var eisini starvsmaður hjá MBM í eini tíggju ár frá fyrst í áttatiárunum. Hann koyrdi tangabil øll hesi árini og røkti sína uppgávu væl. Hann fór úr hesum starvið tá hann bleiv valdur til formann í Jarðarráðnum, eitt álitisstarv, sum hann rókti í nógv ár.

Dánjal hevði eitt lætt lyndi. Hann var hugnaligur at vera saman við, tað veri seg í álvarsomum løtum og vertskapi. Rossaáhugaðir menn munnu óivað minnast aftur á mangar hugnaligar løtur saman við Dánjali. Vit á MBM sakna hann nógv, hann var ein sannur vinur og nógv avhildin av okkum.

Okkara tankar eru hjá Emly og børnunum og teirra familjum. Má gud geva tykkum styrk í sorg tykkara.

Friður veri við minninum um Dánjal á Kjalnesi.

**Eiríkur Thorvaldsson**

### Dagurin

**13. oktober. Angelus**. Fleiri halgimenni bera hetta navn. Tað er latínskt og merkir *eingil*, tað er sendiboð.



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost:
**post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til:
**Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn**
**merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

Sosialurin

**Ringið tel 341800**

Almanna- og heilsumálaráðið:

## Tveir nýggir kommunulæknar í Suðurstreymoyar læknadømi

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, hevur sett kommunulæknarnar Jaspur Petersen og Kára Rasmussen í fast starv í Suðurstreymoyar læknadømi. Teir byrja báðir 1. desember 2004.

Jaspur Petersen, sum hevur verið kommunulækni í Norðuroyggjum í nógv ár, men í løtuni er hann ikki í føstum starvi. Hann skal starvast í viðtaluni í Berjabrekku 1, har Petur Højgaard áður hevur starvast. Kári Rasmussen, sum í løtuni starvast sum kommunulækni í Runavík, skal starvast í viðtaluni í J. Broncksgøtu 7, har Kaj Kallsberg áður hevur starvast.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara kæri maður, pápi, verpápi og abbi,

**Jákup Dahl Olsen**

andaðist í heiminum mánadagin 11. oktober,
71 ára gamal.
Farið verður úr landssjúkrahúskapellinum
mikudagin kl .18.00.
Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju
hósdagin kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*

**Randi,**
**Anna, Gunnar og Beinta**

Tey, ið vilja minnast Jákup, kunnu lata eina gávu til Cystisk Fibrose felagið, konto í peningastovnunum.